

# Martin Næs nýggjur deildarstjóri .......

Mentamálaráðið hevur í dag sett Martin Næs í starv sum deildarstjóra í Mentamáladeildini, ið m.a. umsitur hægri útbúgvingar, gransking, mentan og kirkju. Hann loysir Jóannes Dalsgaard av. Martin Næs er 54 ár og hevur verið landsbókavørður seinastu 22 árini. Er er útbúgvin bókavørður og kandidatur í bókasavns- og upplýsingarfrøði. Hevur røkt eina røð av álitisstørvum, millum annað sum formaður í Rithøvundafelag Føroya, Orðabókagrunninum og Fjøllrit. Eisini hevur hann verið umboð í stýrinum fyri Norðurlandahúsið, føroyskt umboð í Nordbok og Nordinfo undir Norðurl andaráðharraráðnum. Martin Næs tekur við starvinum 1. desember 2007.



# ..... og Una Joensen

Mentamálaráðið hevur eisini í dag sett Unu Joensen í starv sum deildarstjóra í Vinnu- og miðnámsskúladeildini, ið millum annað umsitur allar miðnámsskúlarnar. Tað er studentaskúlar, HF-skeið, Handilsskúlan, teknisku skúlarnar, Fiskivinnuskúlan, Vinnuháskúlan og Yrkisdepilin (lærlingaútbúgvingar). Una Joensen, sum loysir Eyðbjørn Poulsen av, er 41 ár, búskaparfrøðingur og hevur seinastu tíðina arbeitt sum ráðgevi í Fíggjarmálaráðnum. Frammanundan var Una Joensen deildarleiðari í Føroya Tele. Una Joensen hevur eisini fleiri álitisstørv, milluam annað hevur hon verið limur í Búskaparráðnum, nevndarlimur í Landsbankanum og nevndarlimur í KT-felagnum.

# Í næsta valskeiði loysa Føroyar frá Danmark



*Tjóðveldisfólk eru ikki samd um, hvussu stóra ávirkan tey føroysku fólkatingsumboðini hava. Høgni Hoydal, fólkatingsmaður, sigur, fremsta uppgávan hjá teimum komandi fólkatingsumboðunum úr Føroyum, verður at fyrireika uppgerðina millum Føroyar og Danmark, sum verður í næsta valskeiði*

**Formaðurin í Tjóðveldinum er sannførdur um, at vit eina uppgerð við Danmark í næsta valskeiði**

FÓLKATINGSVAL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Í næsta valskeiði verður tað, at eitt uppgerð verður ímillum Føroyar og Danmark.

Tað er formaðurin í Tjóðveldinum, Høgni Hoydal sannførdur um.

Á eykaflokstingi hjá flokkinum sunnudagin, har uppstillingin til fólkatingsvalið var til viðgerð og har staðfesti hann, at í næsta valskeiðið verður uppgerðin ímillum Føroyar og Danmark, gjørd.

- Tann uppgerðin skal vera so virðilig sum gjørlig og uppgávan hjá teimum næstu føroysku fólkatingsumboðunum verður at fyrireika og stuðla uppundir tað uppgerðina ímillum tey bæði londini.

Hann helt eisini, at fólkatingsarbeiðið honum hetta valskeiðið hevur gingið gott og hevur vunnið sær virðing ímillum politikarar í Danmark.

- Tað hevur eisini verið endamálið, segði Høgni Hoydal.

Hann heldur eisini, at sjáldan hevur tað havt størri týdning at vera á varðhaldi á Fólkatingi, enn í næsta valskeiði.

- Vit vita, at ES er í ferð við at gera eina felags grundlóg fyri alt ES og avleiðingin av tí er, at avgerðir, sum danski staturin higartil hevur tikið vegna Føroyar, nú verða fluttar niður til ES høvuðsborgina í Brússel.

Men annars er ein ørgrynna av málum, sum skulu greiðast, bæði málinum um loftrúmið, útlendingamálini og verjumálini.

Tí helt, at tað er av serligum týdningi, at Tjóðveldi aftur fekk umboð á Fólkatingið fyri at tryggja sakliga upplýsing í Danmark um føroysk viðurskifti og at talan er ikki um eitt stríð ímóti Danmark, men um eitt stríð fyri at vinna føroyingum okkara egnu rødd í altjóða samstarvi og at vera á jøvnum føti við Danmark.

Annars helt hann, at høvuðsuppgávurnar hjá føroyskum fólkatingslimir, er at upplýsa um tær avbjóðingar, sum taka seg upp í sambandi við, at vit taka uppgerðina við Danmark í næsta valskeiði. Men annars skulu føroysku fólkatingsmenninir eisini útgreina teir samstarvsmøguleikar vit hava í altjóða samfelagnum, tá ið vit hava tikið ábyrgdina av landinum og at styrkja okkara samleika og at skapa virðing fyri okkum sum tjóð.

Men hann helt eisini, at tað verður ein stór uppgáva at fáa útisetar at taka virknan lut í arbeiðnum at byggja einar frælsar Føroyar og samstundis er tað ein uppgáva at tryggja rættindini hjá føroysku tjóðini og bæði hjá føroyingum í Danmark og hjá dønum í Føroyum, tá ið vit hava gjørt upp við Danmark í næsta valskeiði.

## Vit hava onga ávirkan

Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður, sum hevur boðað frá, at hann er sinnaður at stilla upp, helt, at hetta var alt ov nógv avgjørt, tí ongin skuldi fyrigykla sær, at tey føroysku fólkatingsumboðini hava nakra ávirkan.

-Føroyskir fólkatingslimir hava onga ávirkan og her heima í Føroyum hevur tað lítlan og ongan týdning, staðfesti hann.

- Eisini í royndum okkara at vinna okkum sjálvræði, tí tað er lítið og onki, sum sæst aftur her heima, legði hann afturat.

Hann helt, at tað var nakað annað at brúka fólkatingsvalið til at marknaðarføra tjóðveldispolitikk annars.

Heldur ikki Sjúrður Skaale, sum er í umbúna at stilla upp til fólkatingsvalið, helt, at fólkatingsumboðini í Føroyum hava nakra serliga ávirkan.

Og hann helt, at við at stilla upp til fólkatingsvalið, góðtekur flokkurin í veruleikanum eina skipan, sum hann annars er ímóti.

Kortini helt at hann tá ið støða verður tikin til spurningurin um Tjóðveldi skal stilla upp til fólkatingsval ella ikki, má vigast fyri og ímóti um flokkurin fær so nógv burturúr, at tað uppvigar tað, at hann samstundis góðtekur eina skipan, sum hann í veruleikanum er ímóti.

# Tjóðveldi: Vit skulu ikki rópa so hart um loysing

**Valevni hjá Tjóðveldinum ávarar staðiliga ímóti at rópa ov hart um loysing, tí tað fær veljaran at renna skríggjandi vekk**

FLOKSTING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Í Tjóðveldinum skulu vit ikki rópa ov hart um loysing.

Sjúrður Skaale er valevni hjá Tjóðveldinum, helst bæði til fólkatingsvalið og til løgtingsvalið.

Men á eykaflokstingi sunnudagin um fólkatingsvalið, fekk hann nógv tjóðveldisfólk at klóra sær í nakkanum.

Tá ið hann tók orðið ávaraði hann staðiliga Tjóðveldið ímóti at rópa ov hart um loysing.

Hann helt, at tað kundi tykjast sum eitt rættiliga álopskent herróp at tosa um at loysa frá Danmark.

Men í veruleikanum helt hann, at hetta var rættiliga ússaligt og verjukent, í øllum førum hjá teimum, sum eru eitt sindur burturfrá flokkinum.

- Fyrr í tíðini rópti tjóðveldisfólk ógvuliga har um loysing, men tá var flokkurin heldur ikki so stórur, sum hann er nú.

Hann vísti eisini á fráboðanina hjá Høgna Hoydal, floksformanni, um, at Føroyar skulu loysa í næsta valskeiði og sum vit skriva um í aðrari grein her í blaðnum.

- Vit vita væl, at vit fáa ikki loysing í næsta valskeiði, segði hann og vísti á, at tilsamans hava Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin greiðan meiriluta í Løgtinginum.

- Tí virkar tað at eitt sindur uppgevandi at rópa um loysing nú.

Kortini helt hann, at Tjóðveldi broyttust nógv í 1998, tí tá fekk loysingarhugtakið eisini eitt innihald og tað førdi við sær, at flokkurin hevði stóra framgongd.

Men nú helt hann, at flokkurin í ein ávísan mun var við at detta aftur í tað gamla at rópa hart um loysing-og so onki meir.

- Eg vil ávara staðiliga ímóti at rópa ov hart ímóti at rópa ov hart um loysing, tí tað styggir veljaran langt burtur.

- Veljarin vil ikki hoyra slíkt og tí fara herróp um loysing at fáa veljaran at renna skríggjandi burtur.

Hinvegin helt hann, at okkurt lá eftir frá undanfarnu samgongu og eitt av tí er grundlógin, sum allir flokkar eru samdir um og har tað verður staðfest, at alt vald liggur hjá Føroya Fólki.

Men hesum málið hevur samgongan bølt á í fýra ár, so tað málið er ongantíð komið víðari og Sjúrður Skaale helt, at tað var eitt rættiliga gott mál at fara til val upp á, at fáa grundlógina í gildi.

Tað var skilligt, at hesi orðini komu eitt sindur óvart á summi tjóðveldisfólk.

Men tað vóru eisini tey, sum vóru samd við honum, tí tey hildu, at tað var innihaldið í politikkinum, sum skuldi vinna flokkinum undirtøku hjá veljaranum.

Kortini helt garvaði tjóðveldismaðurin, Heini O. Heinesen, at herrópini um loysing og kvetting var meiri nakað, sum politisk mótstøðufólk høvdu skotið Tjóðveldinum í skógvarnar.

Høgni Hoydal, floksformaður, var samdur við Heina O. Heinesen og hann skoytti upp í, at flokkurin hevði nógv dygdargott tilfar at byggja sín politikk á.